# Fundur í Hvalbiar sóknar kommunu hin 10. sept. 2010

Møtt vóru: Otto West, Trygvi Midjord, Martin í Nesi, Niels Olaf Eyvindsson, Herdis Jensen, Rúni Thomsen og Niels J. Thomsen.

Fundurin varð settur kl. 17.05.

Formaðurin bað um loyvi at taka tvey mál við aftrat, eitt frá Vega- og Havnanevndini og eitt frá N.O. Eyvindsson. Einmælt samtykt at seta hesi mál á skránna og koma tey inn sum mál nr. 7 og 8.

1. **Skriv frá Rúna Thomsen og Martin í Nesi viðv. røkt av sókníni.**
   Samtykt varð at taka upp til næsta fund hvussu nógv sláing av kirkjugørðum, fótbóltsvølli v.m. kostar kommununi árliga.

2. **Skriv frá Rúna Thomsen um umsiting av heimasíðuni.**
   Uppskot frá Rúna um at leggja skrá út áðrenn fund og avrit av gerðabókini eftir fund. Samtykt varð at skriva hvør avgerðin er í hvørjum einstøkum máli og hvat hon er grundað á. Mál, sum eru fyri afturlatnum hurðum tó undantikin.

3. **Skriv viðv. semju um keyp av jørð millum Martin Eið og Hvalbiar Kommunu.**
   Samtykt varð, at Hvalbiar Kommuna keypir burturav matr. nr. 20-41, uml. 36 m. frá vegnum og vinkulrætt yvir. Hetta er ein vídd á uml. 400 m2.

4. **Hvalbiartunnilin.**
   Otto West kunnar um, at 27. sept. 2010 verður fundur við Landsverk um Hvalbiartunnilin og byggisamtyktina hjá Hvalbiar Kommunu. Samtykt varð at biðja tvey feløg gera eina kostnaðarmeting av linjuføringini, sum kommunan leggur út.

5. **Grótbrotið – endurnýggjan av sáttmála við Hagastýrið Suðuri í Haga.**
   Samtykt varð at endurnýggja sáttmálan í verandi líki frá 01.01.2011 til 31.12.2012.

6. **Byggisamtyktin.**
   Málið útsett.

7. **Havnagjøld í Hvalba.**
   Skriv frá reiðaríunum í bygdini viðv. havnagjøldum. Tilmæli frá Vega- og Havnanevndini at havnagjøldini ikki verða hægri í Hvalba enn aðrastaðni, dømi tikið við Tvøroyri. Samtykt varð at havnagjøldini verða tað sama sum á Tvøroyri.

**8. Stuðulspolitikkur hjá Hvalbiar Kommunu.**

Skriv frá Niels Olaf Eyvindsson um at áseta nakrar fastar reglur í sambandi við stuðul til einstaklingar, feløg og tiltøk. Samtykt varð at arbeiða víðari við at fáa ein fastan stuðulspolitikk, sum verður lagdur fram á næsta fundi.

Kunnað varð um ymisk mál.

Fundarbókin lisin og skrivað undir.

Fundurin lokin kl. 19.00.

Otto West    Trygvi Midjord    Martin í Nesi    Niels O. Eyvindsson

Herdis Jensen    Rúni Thomsen    Niels Jacob Thomsen